# Útvarp beinleiðis úr Klaksvík

*Klaksvíkingar fara sunnudagin undir at senda útvarp á Rás 2. Sent verður í fimm tímar hvørt sunnukvøld*

JOHN JOHANNESSEN



*Meginparturin av manningini, sum skal gera útvarp í Studio Pegasus. Frá vinstru: Fróði Løkságarð, Jógvan Svabo, Gunnar Nolsøe, Eyðun Klakstein, Jógvan Eliasen, Hanna Vágsheyg, Steintór Rasmussen, Allan Poulsen, Niklas Heri Jákupsson og Ragnhild Ellingsgaard. Fremst er tað Andrias Sundskarð, teknikkari Mynd: Jan Müller*

Fyri fyrstu ferð nakrantíð fara klaksvíkingar undir regluligar útvarpssendingar, sum verða sendar beinleiðis úr Studio Pegasus í Klaksvík.

Sendingarnar verða at hoyra á Rás 2, sum í løtuni hoyrist av úti við tveimum triðingum av Føroya fólki - í høvuðsstaðnum, í Eysturoynni og í Klaksvík.

Steintór Rasmussen, sum rekur Studio Pegasus, hevur samskipað fyrireikingarnar til útvarpssendingarnar.

- Vit ætla at senda gott og fjølbroytt útvarp, bæði til børn, ung og tilkomin. Øll eiga at finna okkurt, sum tey hava hug at lurta eftir, sigur hann.

**Drúgvar fyrireikingar**

Studio Pegasus, sum hevur tvey ár á baki, hevur higartil verið tónleikastudio, og tað fer tað eisini at verða framyvir.

Men nú eru eini upptøkuhøli gjørd afturat í bygninginum, har Pegasus heldur til, og hesi høli skulu burtur av skal brúkast til útvarpssendingarnar.

Samanlagt hevur Studio Pegasus gjørt íløgur fyri millum 50.000 og 100.000 krónur, so at studio kann gera og senda útvarpssendingar á sama tøkniliga støði, sum føroyingar eru vanir við at hoyra.

- Fyrireikingarnar hava verið drúgvar, og vit hava gjørt nógv burtur. Serliga seinastu vikuna hava vit arbeitt miðvíst fyri at fáa alt upp á pláss. Vit hava gjørt onkrar royndir at senda, og tær hava víst, at alt riggar sum tað skal, sigur Steintór Rasmussen.

Allar sendingarnar verða sendar beinleiðis úr Pegasus í Klaksvík við ISDN-sambandi til Rás 2 í Havn, sum síðani sendir tær út í luftina.



*Ragnhild Ellingsgaard og Allan Poulsen gera sendingarnar Potturin og Náttpotturin, sum verða at hoyra frá klokkan 22.00 sunnukvøld*

**Ymiskar sendingar**

Nógvar og ymiskar sendingar eru á skránni teir fimm tímarnar, Pegasus er í luftini.

Talan er um eina barna- og familjusending, ein nýggjan hittlista útilokandi við føroyskum tónleiki, eina stóra ítróttar- og kjaksending, eina stutta aktualitetssending, eina ungdómssending og eina undirhaldssending.

Nógv fólk eru við í útvarpsarbeiðnum. Tey, sum koma at gera sendingarnar, eru Steintór Rasmussen, Hanna Vágsheyg, Niklas Heri Jákupsson, Gunnar Nolsøe, Fróði Løkságarð, Eyðun Klakstein, Ragnhild Ellingsgaard, Allan Poulsen, Jan Gardar, Jógvan Eliasen og Andrias Sundskarð.

Øll fólkini eru búsitandi í Klaksvík, og talan er um fólk við meiri og minni royndum í fjølmiðlaarbeiði.

**Á egnum beinum**

Rás 2 hevur sent av Brúnaskarði í Klaksvík í tvær vikur, og hetta hevur havt við sær, at rásin nú hoyrist í Klaksvík og í størri parti av Eysturoynni.

Ætlanin hevur alla tíðina verið, at sendast skuldi úr Klaksvík. Tað er ein mánaði síðani, at Rás 2 gjørdi avtalu við Studio Pegasus um at gera útvarpssendingar til Rás 2.

Allar íløgur, sum eru gjørdar í Studio Pegasus, hevur Pegasus sjálvt staðið fyri, men samstarvað verður við Rás 2 um at senda tilfarið út til lurtararnar.

# Lítil virðing fyri einum starvsbólki

*Radiografarnir eru nú í arbeiðssteðgi, tí teir fáa ikki somu viðbøtur, sum sjúkrasystrar, ið gera sama arbeiði. Joan Hentze, forkvinna í felagnum Radiografar í Føroyum, heldur, at Fíggjarmálastýrið vísir radiografunum lítla virðing*

DAGFINN OLSEN

Enn er óvíst, hvussu langur arbeiðssteðgurin hjá radiografunum verður. Heldur ikki er víst, hvørt onnur stig verða tikin.

Joan Hentze, forkvinna í Radiografar í Føroyum, sigur, at tey als ikki vita, hvussu longi arbeiðssteðgurin, sum byrjaði mikumorgunin klokkan 8, fer at standa við.

Felagið sigur í tíðindaskrivi, at arbeiðssteðgurin kemur eftir, at radiografar síðani 7. juni 1999 hava roynt at fáa lønardeildina á tal um sáttmálaviðurskiftini, men uttan úrslit.

Fundur var tó millum lønardeildina og felagið tann 20.03. í ár og í skrivi tann 31.03 boðar lønardeildin frá, at loysn verður funnin fyrsta dagin.

**Lítil virðing**

Síðani hava radiografarnir næstan dagliga heitt á lønardeildina um fund, samstundis sum boðað hevur verið frá, at fyriliggur einki ítøkiligt tekin um vilja til loysn, so kennir felagið hjá radiografunum seg noytt at seta tiltøk í verk.

Í tíðindaskrivi sigur felagið, at lønardeildin hjá Fíggjarmálastýrinum hevur ikki so mikið, sum svarað uppá hesar áheitanir.

Joan Hentze sigur, at myndugleikarnir á henda hátt vísa einum starvsbólki sera lítla virðing. Hon sigur, at Fíggjarmálastýrið ikki ynskir enn eitt felag at samráðast við og at hetta hevur verið nýtt sum grundgeving, umframt at radiografarnir eru ein sera lítil starvsbólkur, bert seks í tali.

Joan Hentze leggur tó dent á, at myndugleikarnir sjálvir í 1989/90 kravdu, at radiografarnir skipaðu seg í bólk.

**Viðbøtur**

Ósemjan snýr seg um, at radiografarnir ganga eftir sama sáttmála, sum sjúkrasystrarnar. Nakrar av sjúkrasystrunum hava verið á skeið, fyri at kunnað seg um starvsøkið hjá radiografum. Sjúkrasystrarnar hava fingið í sín sáttmála, at tær fáa viðbøtur, tá tær gera arbeiðið, sum radiografar gera. Tá radiografarnir taka sær av hesum, liggur ikki fyri hjá teimum at fáa viðbót. Sostatt hava teir lítið gagn av nýggja sáttmálanum hjá sjúkrasystrunum.

Joan Hentze sigur, at Sjúkrasystrafelagið ikki vildi uppí part, tá hini fakfeløgini samdust um at lýsa samhuga við radiografunum, samstundis, sum noktað varð limum at taka upp arbeiði hjá radiografum.

Joan Hentze metir, at Sjúkrasystrafelagið mótarbeiðir radiografunum í hesum málinum.

Enn er ógreitt, hvussu longi arbeiðssteðgurin hjá radiografunum stendur við. Joan Hentze vil tó ikki siga, hvørt hon metir bóltin liggja hjá radiografunum, ella Fíggjarmálastýrinum. Hon sigur, at radiografarnir hava sent rykkjarar dagliga teir síðstu 14 dagarnar og at hetta mugu tey halda fram við um einki hendir.

- Ella kanska vit mugu taka telefonhornið í hond, sigur Joan Hentze, forkvinna í Radiografar Í Føroyum.



